## EG MEINI TAÐ

# Svakir arabar ella svakir føroyingar?



*John Johannessen, tíðindamaður*

»Arabar eru svakir«. »Hasir fanarnir mugu bumbast í hel ongantíð ov skjótt.« »Vit mugu vara okkum fyri muslimum«. »Ein sannur muslimur hatar ikki bara USA og Ísrael. Ein sannur muslimur hatar TEG! Hann ynskir at DREPA TEG!«

Slíkar útmeldingar eru vorðnar vanligar millum føroyingar á gøtuni og í viðmerkingum í føroysku bløðunum síðani væl kendu herviligu atsóknirnar móti USA 11. september.

Tað er helst rætt, at tað er ein víðgongdur muslimskur fundamentalistur, ið stendur aftan fyri atsóknirnar. Og tað er prógvað, at tað vóru svakir muslimar, ið rændu tey fýra amerikansku rutuflogførini. Tað er eisini prógvað, at muslimsku flogrænararnir sótu handan róðrið, tá tvey av flogførunum kaldblóðiga vórðu stýrd inn í World Trade Centre í New York og eitt inn í bygningin hjá Pentagon í Washington, meðan tað fjórða orsakað av klandri umborð datt niður í óbygdum øki.

Harafturat er eisini staðfest, at atsóknirnar kravdu fleiri túsund mannalív.

Ræðuligt! Ja, sanniliga ræðuligt, sorgarligt og óskiljandi. Eingin ivi um tað.

Men fyri tað, at tað vóru arabar, ið framdu yvirgangsatsóknirnar, gevur tað so okkum rætt at fordøma allan tann arabiska heimin? Gevur tað okkum rætt at fordøma friðarliga og lítilætna grønmetishandlaran á Nørrebrúgv? Gevur tað okkum rætt til at fordøma kúgaðu afgansku kvinnuna í Kabul, sum er í vanda fyri at verða dripin, vágar hon sær at lesa eitt blað ella fer út at spáka, uttan at hava mannin undir liðini á sær? Ella gevur tað okkum rætt at fordøma handilsmannin í hornakioskini á Vesterbrúgv, sum so fryntligur í bestu meining plagar at selja okkum nakrar øl og bjargar kvøldinum, tá tostin kemur í úrtíð?

Nei, eg haldi ikki... Als ikki.

Føroyar eru ein kristin tjóð. Hesum dámar okkum væl at reypa av. Okkum dámar eisini óføra væl at reypa okkum av, at vit eru eitt friðarelskandi fólk. Somuleiðis reypa vit javnan av, at føroyingar eru so frágera gestablíðir móti fremmandafólki. Men okkum dámar eftir øllum at døma ikki arabar...

»Tú skalt elska næsta tín, sum sjálvan teg«. Hetta brotið úr Halgubók kenna flestu føroyingar. Og tey, sum gera nógv við at prædika, vísa javnan á hetta skriftstað, eins og tey prædika um frið og gleði í kristindóminum, og at vit skulu biðja fyri okkara fíggindum.

Islam – trúgvin hjá muslimum – er ikki eins friðarelskandi. Í Koranini verða muslimar beinleiðis eggjaðir til at doyggja í heilagum kríggi fyri muslimsku trúnni. Og tað eru nógvir fundamentalistiskir arabar, ið liva beint eftir tí, sum Koranin fyriskrivar. Hesir hava einki ímóti at doyggja í heilagum kríggi móti Ísrael, USA ella onkrum av kristnu londunum í Vesturheiminum. Ein av hesum er Osama bin Ladin, sum eftir øllum at døma stendur aftan fyri yvirgangsatsóknirnar í USA.

Men eins og innan kristindómin, er tað ymiskt, hvussu arabar lesa og liva eftir Koranini. Teir eru ikki allir fundamentalistar.

Tað eru ikki øll kristin, ið lata vera við at eta fleskasteik, hóast tað í Gamla Testamenti verður bannað okkum at eta grís. Og tað eru heldur ikki allir muslimar, ið ganga inn fyri at drepa frá hond.

Tí eiga vit kristnu føroyingar sanniliga at vara okkum, áðrenn vit fordøma hvønn einasta muslim í heiminum. Fordøma vit øll, sum eru muslimar, ger tað okkum eisini til fundamentalistar. Og ynskja vit, at Afghanistan skal bumbast í sorl, sum hevnd fyri, at Osama bin Ladin sleppur at búgva har, er ivasamt, um vit ikki eru eins ræðulig, sum teir, ið framdu yvirgangsatsóknirnar í USA.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo

Blaðstjórn: Turið Kjølbro

6. oktober 1992:

# Níggju ár síðani búskaparliga kvørkratakið

**Í dag eru liðin níggju ár síðani Sjóvinnubankin varð bjargaður undan húsagangi**

BANKAKREPPAN

*Eirikur Lindenskov*

Fáur mundi gruna henda vakra týsmorgunin, hvussu stóran týdning hesin dagur fór at fáa fyri Føroya framtíð: Týsdagurin 6. oktober 1992.

Í Sjóvinnubankanum í Húsagøtu í Havn varð reikað fyri stórari móttøku, tí hendan dagin skuldi bankin hátíðarhalda seksti ára stovningardagin.

Ikki fyrr enn út á fyrrapartin gjørdist greitt, at Atli P. Dam, løgmaður, og Jógvan Sundstein, fíggjarmálaráðharri – sum púra óvitandi um álvarsomu støðuna vóru skræddir upp úr svøvni á nátt – saman við banka- og sparikassastjóra og øðrum týdningarmiklum fólkum høvdu sitið í forsætismálaráðnum hjá Poul Schlüter og samráðst um at bjarga Sjóvinnubankanum, sum var komin í fíggjarligt óføri.



tíðindablaðið

sosialurin

5 ferðir um vikuna

PENGARNIR BJARGAÐIR

Fólk fingu rættiligan skelk, tá tað í gjár frættist, at kreppuloysn mátti til fyri at bjarga Sjóvinnubankanum og Føroya Banka

SKELKUR

SÍÐURNAR 3, 5, 6 & 7

*Forsíðan á Sosialinum 7. okt. 1992*

### Skelkur

– Fólk fingu rættiligan skelk, tá tað í gjár frættist, at kreppuloysn mátti til fyri at bjarga Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, skrivaði Sosialurin á forsíðuni dagin eftir, 7. oktober.

Í blaðnum eru eisini samrøður við fólk, sum í panikki tóku allar pengarnar út, sum tey áttu, av ótta fyri at missa alt. Um móttøkuna í sambandi við 60 ára stovningardagin skrivar blaðið, at har var dapur stemningur – ikki heilt ólíkt ervi.

– Vit høvdu ætlað at havt eina stóra veitslu leygarkvøldið í badmintonhøllini fyri at halda 60 ára dagin, men hon verður helst av ongum, visti Edvard Heen, ein av hægstu monnum bankans, at siga.

### Pest og kolera

Atli Dam og hinir í »samráðingarnevndini« høvdu tað helst ikki so lætt. Hann segði valið verða sum at velja millum pest og kolera. Hann legði dent á, at ein og hvør kundi ímyndað sær, hvørjar avleiðingar tað hevði fingið fyri føroyska samfelagið, um Sjóvinnubankin stongdi hendan dagin. Hann segði, at avtalan tí var neyðug. Hann var ikki nøgdur við alt í avtaluni, men hetta var so tað, sum í eini knappari vend varð møguligt at fáa upp at standa, segði hann.

### Strong krøv

Avtalan millum landsstýrið og donsku stjórnina gekk m. a. út upp á, at Tjóðbankin skuldi tilføra Sjóvinnubankanum 500 milliónir krónur. Treytin var, at landsstýrið fylgdi eini fíggjarpolitiskari stabiliseringsætlan. Hendan ætlan skuldi gerast eftir altjóða reglum fyri endurreising, og hon skuldi gerast innan fimm mánaðir. Ætlanin skuldi gerast av óvildugum fíggjarserfrøðingum, sum skuldu verða læntir frá IMF, altjóða gjaldoyrafelagsskapinum.

Umframt tað, so var eitt krav, at javnvág skuldi verða á fíggjarlógini fyri 1993, og at landsstýrið skuldi hjálpa til við eini nýmótansgerð av føroysku vinnulívslógini, herundir eisini banka-, partafelags- og grannskoðaralógini.

Eginpeningurin í Sjóvinnubankanum varð við hesum niðurskrivaður frá 98 milliónum til 15 milliónir.

### Skrædlaðir partaeigarar

Hóast bankin varð bjargaður, so var tað einki stuttligt at vera partaeigari – í øllum førum ikki, um tú vart ein av teimum stóru. Sosialurin setti tað soleiðis upp:

- Fríggjadagin: Átti tú eitt partabræv í Sjóvinnubankanum upp á 1.000 krónur, so hevði tú kunna selt tað til kurs 430 fyri 4.300 krónur
- Týsdagin: Sama partabræv upp á 1.000 krónur kann nú seljast fyri 140 krónur, ella til kurs 14
- Fiskasølan og Tryggingarsambandið, teir størstu eigararnir í Sjóvinnubankanum, mistu ávikavist 100 og 125 milliónur í aktuellum søluvirði.

### Hornasteinur ella…

Nógv orð eru síðani fallin um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Til ber at siga, at 6. oktober 1992 er ein hornasteinur – ikki bara í svárastu kreppu føroyinga í nýggjari tíð – út frá honum skaptist nýggja politiska grundarlagið hjá einum flokki, sum frá at verða komin í eina »Gamla Sjálvstýristøðu« í einum djúpum politiskum aldudali, nú er landsins størsti flokkur og hevur sett kós Føroya úr danska ríkinum.

Hóast kreppur og stríð síðani politiska floksbýtið millum sjálvstýri og samband í 1906 javnan hava ført til tjóðskaparligar rembingar, so tykist enn eingin eyðsædd loysn í ljósmála – kanska tíðin er liðin ov langt frá 6. oktober 1992?



# Selt antikvitetir í fjórðingsøld

**- Tá eg fyri meira enn 25 árum síðani sá tríggjar nærum eins stovur uppá eina viku, helt eg, at okkurt skuldi gerast. Tí fór eg at selja antikvitetir, sigur nú 70 ára gamla Noomi Juul, ið býr í Havn**

PORTRETT

*Ingrid Bjarnastein*

Eini fitt gomul hús á Stykkinum eru karmur um samrøðuna. Húsini eru gomul, gjørd úr viði, og inni standa nógvir gamlir lutir. Hetta eru húsini hjá systir Noomi Juul, ið er ættað av Tvøroyri, men býr í Havn. Tey, sum kenna nú 70 ára gomlu Noomi Juul, vita, at hon selur antikvitetir og elskar djór. Hon hevur selt antikvitetir í meira enn 25 ár, og sigur hon grundina vera, at tá hon uppá eina viku sá tríggjar stovur, ið vóru púra eins, helt hon, at nú var tíðin komin til at fríska eitt sindur upp.

- Eg selji antikvitetir av áhuga, greiðir Noomi Juul frá.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri antikvitetum, og í 1973 fór eg í holt at selja í Føroyum.



*Noomi Juul stovnaði Djóraverndarfelagið á sinni og var forkvinna í felagnum í nógv ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað vísir seg, at áhugin fyri antikvitetum í Føroyum er ógvuliga stórur. Tað er ongin ávísur keyparaskari. Bæði ung og gomul ynskja at ogna sær gamlar møblar og gamlar lutir.

- Ein lutur er ikki antikkur fyrr enn hann er 100 ár. Tí royni eg at ansa eftir tá eg skrivi lýsingar, tí eg selji eisini gamlar lutir. Ein lutur er longu gamal tá hann er eitt- tvey ár, sigur Noomi.

### Keypir úr Danmark

- Tá eg keypi inn, hyggi eg eftir tí, sum mær sjálvari dámar ella um fólk hava biðið meg funnið okkurt serligt. Tað er so stuttligt, tá fólk biðja meg finna okkurt, sum tey hava sæð onkra aðrastaðni, tí tá kann eg við gleði svara, at tað kann eg tíbetur ikki. Tað er jú hetta, sum er endamálið við tí heila. At øll ikki hava tað sama, sigur Noomi Juul.

Noomi keypir frá Herholdt Jensen, sum er í Danmark. Sjálv sigur hon, at hetta er næstbesti seljari, ið selur antikvitetir í Danmark.

- Vit hava eitt ógvuliga gott samstarv. Áðrenn hvørja aktión, fái eg ein faldara sendandi, har eg so velji teir lutirnar burturúr, ið eg vil hava. So ringi eg niður og sigi, hvat fyri lutir bjóðast skal uppá fyri meg. Eg eri niðri tvær ferðir um árið sjálv og keypi, fortelur Noomi Juul.

- Tað er ógvuliga ymiskt hvørja ferð, hvat tað er, ið eg bíleggi.

Vert kann eisini vera at nevna, at Føroyar hava, sum einasta land í Europa, toll á antikviteti.

- Tey fyrstu tvey árini var ongin tollur á, men so brádliga settu teir toll á, sigur Noomi.

- Hevði tollur ikki verið á vørunum, høvdu antikvitetir allarhelst verið meira útbreiddir í Føroyum.

Spurd um, hvussu leingi hon ætlar at halda fram við at selja antikvitetir, svarar Noomi Juul:

- Eg eri ikki ung longur, men so leingi kreftirnar eru til tess, vil eg royna at halda fram við at selja. Tað er ongin grund at leggjast hendur í favn, bert tí man er vorðin pensiónist.

### Djóraelskari

Sofus, Katja, Snorri og Tór. Nei, tað eru ikki børnini, men djórini, sum Noomi eigur. Sofus er ein 30 ára gamal papageykur, Katja og Snorri eru ketta og frensur, og Tór er ein colliehundur.

- Eg havi tað so ræðuligt tá eg síggi djór, ið hava tað ringt, og eg ikki fái hjálpt teimum, sigur Noomi Juul.

Noomi Juul stovnaði Djóraverndarfelagið á sinni, og var sjálv formaður har í umleið 10 ár. Tá hon fór úr Djóraverndarfelagnum var tað tí, at hon vildi hava ein steðg,

- Men tað merki eg ikki nógv til, sigur Noomi og flennur. -Fólk ringja enn til mín, og telefonstøðin gevur teimum hvørja ferð mítt nummar. Men tað leggi eg ikki so nógv í. Tað er gott at kunna hjálpa, og nú tá eg ikki eri formaður, fái eg ofta hjálpt betur, sigur Noomi Juul at enda í viðtaluni.



*- Eg havi tað so ringt, tá ið eg síggi djór, sum hava tað ringt og eg ikki fái hjálpt teimum, sigur 70 ára gamla Noomi Juul, her avmyndað saman við hundinum Cox.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Menn kunnu - ella kunnu teir

**Verða menn diskrimineraðir, tá ið teir ikki megna at sameina heim og arbeiði? Hesin og aðrir spurningar standa á dagskránni á ráðstevnu um menn, arbeiðslív og javnstøðu, sum verður síðst í hesum mánaðinum**

RÁÐSTEVNA

*Turið Kjølbro*

Møguleikar og forðingar hjá monnum at taka lut í arbeiðslívinum og familjulívinum eru á dagsskránni á spennandi ráðstevnu, sum verður hildin sunnudagin 28. oktober í Den Sorte Diamant í Keypmannahvan. Tað er Norðurlendska Instituttið fyri kvinnu- og kynsgransking sum skipar fyri ráðstevnuni.

Ráðstevnan er ætlað politikarum, arbeiðstakarum, arbeiðsgevarum, embætismonnum og -kvinnum og granskarum í Norðurlondum. Høvuðsendamálið við ráðstevnuni er at kjakast um valmøguleikarnar hjá monnum, tá ið tað snýr seg um at sameina arbeiði og familju.

Lítið og einki hevur verið kjakast um menn og javnrættindi, heldur ikki, tá ið tað snýr seg um týdningarmesta partin í lívinum hjá flestu monnum, nevniliga arbeiðslívið. Í februar í ár góvu Norðurlendska Ráðharraráðið og Nordens Faglige Samorganistation í felag út ritið “Kunnu menn? Menn og javnrættindini í arbeiðslívinum”. Ritið er ætlað sum grundarlag undir viðgerðini av, hvussu myndugleikar, partarnir á arbeiðsmarknaðinum og gransking kunnu skipa og gjøgnumføra ítøkilig tiltøk, ið kunnu gera sítt til, at menn fáa gagn av einum virknum javnstøðupolitikki. Ráðstevnan í oktober fylgir tonkunum í ritinum upp.

Fyritreytin fyri einum virknum javnstøðupolitikki er, at menn gera sær greitt, hvørji ynski og hvønn tørv teir hava gjøgnum demokratiskar tilgongdir á arbeiðsplássinum, í politiskum flokkum, fakfeløgum, almennum kjaki og privatlívinum. Fyrireikararnir av ráðstevnuni vóna at menna politiska kjakið um menn, javnstøðu og arbeiðslív millum politikarar og partar á arbeiðsmarknaðinum fyri at vit kunnu fáa ein heildarkendan javnstøðupolitikk, sum er góður bæði fyri kvinnur og menn.

Millum fyrilestrahaldararnar eru Anne Knudsen, blaðstjóri á Weekendavisen, Margreta Winberg, landbúnaðar- og javnstøðumálaráðharri í Svøríki, Árni M. Mathiesen, fiskimálaráðharri í Íslandi, og Ove Hygum, arbeiðsmarknaðarmálaráðharri í Danmark.